# BYGGIFRØÐINGUR/ ARKITEKTUR

Søkt verður eftir byggifrøðingi, arkitekti ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari ungari teknistovu í menning, har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**
*Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um:*
- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni og vera hugaður at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2004.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Sosialurin 341800

EM RÁÐGEVING
RÁÐGEVANDI BYGGIFRØÐINGAR

EM Ráðgeving Sp/F
Heiðavegur 15 A • FO-600 Saltangará
Tlf.: 477 700 • Fax: 477 701 • emr@kallnet.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

www.torshavn.fo

# Ólavsøkan 2004

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til mánadagin 21. juni 2004 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 21. juni 2004 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.





Hestprent
gevur
pappírinum
betri flog

HESTPRENT



Vit selja
DAEWOO
Skips motorar

FRÁ 20 HK TIL 1000 HK



GENERATORAR · STÝRIMASKINUR

TILBOÐ:
320 HK BÁTAMOTORUR
Prísur u/mvg 100.000 kr.

Umboð:
Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · 100 Tórshavn
Tel 317713 · Fartel 283138





Barnagarðurin á Konmansmýru

# Pedagogar

**Vit søkja eftir tveimum pedagogum**
Ein pedagog 30 tímar og ein pedagog 35 tímar um vikuna frá 1. juli ella 1. august 2004.
Søkir ongin pedagogur verða hjálparfólk sett.

**Vit eru** ein glaður og humoristiskur starvsfólkabólkur,
Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.
Á hvørjari stovu eru 17 børn. Tey 6-7 ára gomlu eru í stovu fyri seg.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Byrjunarstig 10.

**Er hetta tú**, so send okkum eina umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum til okkum áðrenn 9. juni 2004.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, tlf. 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 24. mai 2004.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**



# Ítrottarhøllin í Vestmanna á bátastevnuni

**Kl. 16.00-20.00** Mini-tivoli í ítróttarhøllini við fiskibrunni, bóltkasti, seymsláing, klatriveggi, andlitsmáling, kaffisølu, skot uppá mál, tombola og myndatøku. Pony-ríðing verður uttanfyri høllina.



**Fyriskiparar VÍF Gentir og dreingir 12 ár**



# Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 $m^2$ og er møguleiki fyri at víðka til 200 $m^2$. Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 $m^2$/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**



# Umsjónarmaður til Badmintonhøllina

Søkt verður eftir umsjónarmanni til Badmintonhøllina, at byrja 1. august ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er nakrar tímar um vikuna.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Dánial á tlf 317461. ella Peter á tlf 319604 eftir kl. 17 og áðrenn 22. mai

**Badmintonfelagið í Havn**



BILUR TIL SØLU



Tel. 31 28 90 ella 21 28 90




## Skrá fyri Bygdastevnuna á Skála í døgunum 20. - 23. mai

**Hósdagur 20. mai**
kl. 19.30 **Hugnkvøld í skúlanum.** Petur Martin Rasmussen fer at siga frá siðsøguligum hendingum av Skálafjørðinum og Jógvan Fríðrikson hevur ymiskt til gaman og álvara. Felagssangur verður og eisini syngur ungdómsbólkurin av Skála. Atgongumerkir fáast við dyrnar.

**Fríggjadagur 21. mai**
kl. 18.15 **Rennikapping fyri vaksin og børn.** Renningin byrjar við læknahølið. Tilmelding fer fram á heimasíðuni, www.athletics.fo, í seinasta lagi **hóskvøldið 20. mai, kl. 20.00**.
kl. 18.45 **Vaksin** renna 6,4 km (teinin tvær ferðir).
kl. 18.45 **Ung 14-17 ár** (f. 87-90) renna 3,2 km (teinin eina ferð).
kl. 18.45 **Børn 11-13 ár** (f. 91-93) renna 3,2 km (teinin eina ferð).
kl. 19.15 **Børn 8-10 ár** (f. 94-96 ) renna hálvan km.
kl. 19.25 **Børn yngri enn 7 ár** (f. 97 og seinni) renna hálvan km. Heiðursmerkir verða handað við læknahølini.
kl. 21.00 **Ungdómsmøti í Meinigheitshúsinum.** Eisini verður café.



**Leygardagur 22. mai**
kl. 09.00 **Fótbóltur.** Skála, B68, EB/Streymur, NSÍ - pinkur.
kl. 11.00 **Fótbóltur.** Skála b, GÍ b, NSÍ b, KÍ b - gentur 10-12 ár.
kl. 13.00 **Fótbóltur.** Skála b – KÍ b - smágentur.
kl. 14.00 **Fótbóltur.** Skála a – NSÍ a - smágentur.
kl. 16.30 **Stevnan verður sett í høllini av Kára Johannesen, bygdaráðsformanni.**
kl. 16.45 **Tivoli letur upp** við bamsutombola, blandaðum tombola, 21-spæli, fiskidammi, skreiðiborg, hoppiborgum, gladiatorbana, esli, »high striker« fyri børn, sumoglíming fyri børn, og sumoglíming fyri vaksin.
kl. 17.00 **Barnakóri av Skála** syngur í høllini.
kl. 18.00 **Angela og Ásbjørn** undirhalda í høllini.
kl. 19.00 **Vørutombola í høllini.**
kl. 21.30 **Birgir og Jónsvein** undirhalda í høllini.
kl. 23.30 **Dansur.** Góður enskur dansur við Hjalta Joensen og vinmonnum í bygdasalinum.

**Sunnudagur 23. mai**
kl. 11.00 **Familjugudstænasta.** Jógvan Fríðrikson, prestur, prædikar.
kl. 11.00 **Morgunmøti í Nerija.**
kl. 12.30 **Súkklukapping fyri vaksin.** Frá læknahølunum til Gøtueiði og aftur.
kl. 13.45 **Súkklukapping fyri børn.** Frá læknahølunum inn á Mann og aftur. Býtt verður upp í aldursbólkar, gentur og dreingur. **Øll skulu vera í hjálmi.**
kl. 14.30 **Tivoli letur upp** á kajøkinum.
kl. 14.30 **Caféin í spælistovuni** letur upp.
kl. 15.00 **Kappróður.** Steypini verða handað á kajøkinum beint eftir seinasta róðurin.
kl. 16.00 **Undirhald á sjónum niðan fyri El-Service.** Kapprógving við gummibátum, møguleiki verður fyri at súkkla um kapp á flakum ið liggja á sjónum, o. a.
kl. 17.00 **Bingo** í bygdasalinum.
kl. 18.00 **Fótbóltur.** Skála - B68, 1. deild.
kl. 19.00 **Ytrimissiónsmøtið** í Meinigheitshúsinum við Snorra Brend.
kl. 20.00 **Brotssparkskapping** á vøllinum fyri vaksin og børn.


FØROYA HANDILSSKÚLI

# AkademiMerkonom
## Heysthálvan 2004

Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir lesnað til Akademi-Merkonom.

**Lærugreinar:**

| **Tórshavn:** | **Dagur:** | **kl.:** |
|---|---|---|
| Hagfrøði/ *Statistik* | týsdagur | 18.00-21.20 |
| Human Resource Management | mánadagur | 18.00-21.20 |
| Altjóða samskifti/ *Global kommunikation* | mikudagur | 18.00-21.20 |
| **Kambsdal:** | | |
| Altjóða búskapur/ *Global økonomi* | mánadagur | 18.00-21.20 |
| **Vágar:** | | |
| Søla og marknaðarførsla/ *Afsætning* | mikudagur | 18.00-21.20 |
| **Norðoyggjar:** | | |
| Søla og marknaðarførsla/ *Afsætning* | mikudagur | 18.00-21.20 |
| Leiðsla í verki/ *Ledelse i praksis* | mánadagur | 18.00-21.20 |
| **Suðuroy:** | | |
| KT og búskapur/ *IT og økonomi* | mikudagur | 18.00-21.20 |

**Undirvísingin byrjar í viku 36. Próvtøkan verður í januar**

**AkademiMerkonom** er ein akademi-útbúgving, sum er á útbúgvingarstigi beint undir bachelorstigi. Møguleiki verður seinni at taka yvirbygning svarandi til bachelorstig.

**Upptøkutreytir:**
1. Viðkomandi yrkisútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C / Virkisbúskapur C
2. Viðkomandi grundútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C ella við Virkisbúskapi
3. Miðnámsútbúgving antin við støddfrøði C ella við Virkisbúskapi C
4. Onnur viðkomandi útbúgving svarandi til støði nevnt í pkt. nr. 1-3

Umsøkjarin skal hava minst 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir aftaná at hava lokið miðnámsútbúgving.

**Skiftisskipan:**
Øll, sum hava minst 2 merkonomlærugreinar og drúgvar viðkomandi vinnulívsroyndir, verða upptikin hóast omanfyristandandi treytir.

**Innskrivingarseðil og upplýsingar um AkademiMerkonom finnur tú á heimasíðu skúlans *www.fh.fo* ella við at ringja til skúlan.**

**Umsóknarfreistin er 13. august 2004**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður · Tel 444900 · Telefax 444901
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin við Maritugøtu**

í dagstovninum við Maritugøtu fara at ganga 36 børn.

Stovnurin er skipaður við 3 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari. Aldursbýtið verður tó broytt alt eftir tørvi.

**Vit bjóða**
níggju áhugaverd størv, har starvsfólkið, saman við leiðaranum fær møguleika at seta dám á stovnin og taka lut í øllum tí, sum krevst fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan.

www.torshavn.fo

## Pedagogar og hjálparfólk til nýggja dagstovnin við Maritugøtu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum og hjálparfólkum til Býlingshúsið í Maritugøtu at byrja 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Søkt verður eftir:**
- einum varaleiðari at arbeiða 40 tímar um vikuna
- t rimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna
- tveimum pedagogum at arbeiða 25 tímar um vikuna
- einum hjálparfólki at arbeiða 40 tímar um vikuna
- tveimum hjálparfólkum 25 tímar um vikuna

**Vit vænta**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði. Vit vænta, at tú ert opin fyri bygnaðarbroytingum.

**Setanarvíðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið Føroya

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir stovnsleiðara, tlf. 272929 ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 2. juni 2004. Viðmerkið á umsóknina "Pedagogur Maritugøta".








P/f Jógvan Weihe
Heil- og smásøla

TOBIS
Nýfiskaður Tobis á goymslu

*Staravegur 15 · Tel. 31 38 97 · Fartel. 21 38 97 · Fax 31 38 83*
*Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo*
*heimasíða: www.jogvan-weihe.fo*